# Fantastisk atmosfera



**Óli Johannesen helt, at føroyska liðið tóktist hava ov stóra virðing fyri mótstøðuni fyrstu trý korterini**

LIÐSKIPARIN
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Dublin, Írland:** Karmarnir vóru í topp, tá føroyska liðið skuldi til próvtøku í Dublin. Fult hús – 36.000 áskoðarar – vóru til dystin. Og allan dystin á tamb hildu hesir ein slíkan gang, at tann so vanliga ljódligi 12. maðurin hjá okkum, sum eisini var óvanliga væl mannaður hesaferð, mest sum als ikki slapp upp í part.

Men hóast hetta seinasta, so vildi føroyski liðskiparin á ongan hátt siga, at teir merktu minni til føroyska stuðulin, enn teir annars gera. Heldur tvørturímóti.

- Fyrst og fremst, so er tað sum leikari ótrúliga stuttligt at uppliva slíkar dystir. Og at føroysku áskoðararnir tú kunnu drukna í ljóðmúrinum, haldi eg avgjørt ikki er nakað, sum nervaði okkum í so máta. Vit sóu teir alla tíðina, og vit vistu, at teir vóru har, og vit vistu, at teir eisini royndu at rópa, so tað er heilt víst nakað, sum merkir nógv fyri okkum leikarar, staðfesti liðskiparin.

### Ov stóra virðing

Um dystin sjálvan vóru orðini frá Óla ikki so stórt øðrvísi, enn tey vóru frá hinum í føroysku leguni, men hann fýltist kanska á, at virðingin hevði verið í meira lagi.

- Tað virkaði, sum var tað heila eitt sindur krampaktugt hjá okkum fyri steðgin. Eins og tordu vit ikki ordiliga at fara í mótstøðuna, og tað hava vit ikki ráð til. Men eg haldi, at vit spældu okkum væl upp eftir steðgin.

*- Vit sóu teir alla tíðina, og vit vistu, at teir vóru har, og vit vistu, at teir eisini royndu at rópa, so tað er heilt víst nakað, sum merkir nógv fyri okkum leikarar, segði Óli um føroysku áskoðararnar, sum mest sum druknaðu í øgiliga ljóðmúrinum á Landsdowne Road*

*Og føroyska verjan stóð seg fyri tað mesta eisini væl?*

- Tann partin haldi eg ikki, at vit skulu vera ónøgdir um. Taktikkurin í so máta eydnaðist fyri tað mesta, og sjálvt um teir koma til møguleikar, so skalt tú ikki gloyma, at hatta var eitt sera gott lið, sum alla tíðina helt á kvikum fótbólti, og tá stendur nógv á verjuni. Vit høvdu so eisini fingið rættað nakrar smálutir í verjuspælinum í mun til dystin á Cypros, soleiðis at vit kundu standa betri á vøllinum.

Eina løtu sá eisini út til, at drúgva ferðin úr Cypros hevði sett síni spor á liðið, sum í mangar mátar tóktist stirvið fyri steðgin. Men hetta helt liðskiparin so ikki, at teir kunnu brúka til nakað.

- Tað haldi eg ikki. Vit høvdu eina góða venjing mánadagin, har eg haldi allir virkaðu til at hava rist møðina av sær. So eg haldi ikki, at hetta gjørdi nakran stóran skaða sum so.

### Týðandi stuðul

Áðrenn vit heilt sleptu føroyska liðskiparanum, vildi Óli eisini sjálvur bera nakrar heilsur, nú enn eitt fótbóltsár er av.

- Lat meg enda takka øllum føroyskum áskoðarum fyri árið í ár. Bæði teimum, sum vóru her í Dublin og teimum, sum vóru á Cypros, og sjálvandi eisini øllum teimum, sum hava bakkað okkum upp á heimavølli. Tað er ein stuðul, sum hevur ótrúliga stóran týdning hjá okkum leikarum.

- Og so haldi eg eisini, at John Petersen skal hava eitt ordans farvæl. Tað verður ein stórur missur fyri landsliðið og fyri føroyskan fótbólt, at hann nú ikki longur er við, men eg vil í øllum førum ynskja honum alt tað besta framyvir, staðfesti føroyski liðskiparin og metmaðurin at enda.


## 407'arin besti arbeiðsbilur í Danmark



Danska avísin Børsen hevur júst gjørt árligu royndina, "Danmarks bedste Jobbil". Hetta er fimta árið á rað, at royndin verður gjørd, og í ár stóð kappingin millum 9 dieselbilar. Bilarnir verða royndir uppá allar hugsandi mátar, í býum, landavegi og motorvegi, men eisini verður roynt at leggja trýst á bilarnir í óvanligum støðum, ímeðan kannað verður, hvussu bilarnir klára hesar støðurnar. Hvør bilur fær stig fyri tíggju ymisk øki, har karakterurin er á stiganum 0-10 (10 er best). Samlaða úrslitið er miðal av tølunum hjá teimum fýra dómarunum, ið ikki kendu úrslitið hvør hjá øðrum. Endaliga úrslitið var hetta:

**Besti arbeiðsbilur í Danmark 2004**

| *Nr.* | *Merki* | *Stig (max. 100)* |
|---|---|---|
| 1 | Peugeot 407 1,6 HDI | 87,5 |
| 2 | VW Passat 1,9 TDI | 85,1 |
| 3 | Skoda Octavia 1,9 TDI | 78,9 |
| 4 | Renault Laguna 1,9 cDi | 75,9 |
| 5 | Ford Mondeo 2,0 TDCi | 73,9 |
| 6 | Mazda 6 2,0 DE | 71,4 |
| 7 | Toyota Avensis 2,0 D | 69,7 |

Um vinnaran, Peugeot 407, verður millum annað sagt: "Vit máttu líka ringja til Peugeot fyri at kanna tað enn einaferð. Peugeot valdi at senda ein 407'ara við 1,6 liturs HDI motori, og hann skuldi kappast við 8 øðrum 1,9 og 2,0 liturs diesel-lokomotivum. Men Peugeot 407 1,6 HDI kom, sá og sigraði við tí minsta motorinum í bólkinum… 1,6 liturs HDI motorurin er ein lítil perla… Flott snið, lekkurt interiør og framúr koyrigleði... Trupult er at seta fingurin á nakað… Øll eru samd um at rósa undirvogninum fyri eginleikarnar, og bilurin livdi eisini upp til hetta í royndunum… 407'arin er ikki einans ein av teimum nýggjastu og mest komfortablu í hesum bólkinum, hendan útgávan er eisini ein av teimum alrabíligastu bilunum á marknaðinum…"

Samanumtikið er eingin ivi, Peugeot 407 1,6 HDI koyrir avstað við heitinum "Besti arbeiðsbilur í Danmark 2004".

*Kelda: Børsen*

Sosialurin 311820

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 34 54 00






*Undan dystinum savnaðust áskoðararnir á Kitty O'Shea, ið er ein pub nærhendis Landsdowne Road*



*Teir royndu eisini á leikvøllinum, men fyri tað nógva, so mundi upplivingin hesaferð snúgva seg um bretsku fanmentanina, tá hendan er allar best*

# Upphitingin var í lagi

**Sum vant var felags upphiting hjá 12. manni á skránni, men á leikvøllinum tóktist hendan tó ikki muna tað heilt nógva á fullsetta leikvøllinum**

12. MAÐUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Dublin, Írland:**
Sum vant, so hevði 12. maður gjørt seg til, nú enn ein landsdystur var á skránni. Samlaða føroyska ferðalagið í írska høvuðsstaðnum var somikið stórt, at tað var ikki hugsingur um at hava øll á einum stað, men fyri tað kundi upphitingin miðsavnast.

Hetta varð gjørt á eini pub nærhendis stadion, og tó at hópur av írum eisini hildu til her, so tóktist tað ikki at gera tað allar minsta við føroyska lagið. Írskir fólkasangir og føroyskir fótbóltssangir vóru á skránni.

Eisini undir dystinum sjálvum varð roynt at halda nakað av gangi, men her var skjótt greitt, at okkara vóru við undirlutan. Eitt var, at hini vóru omanfyri 35.000 í tali. Annað var, at hesi allan dystin á tamb hildu ein ófatuligan gang. Onkra einstaka ferðina royndi føroyski vongurin at stemma í, og tað eydnaðist eisini einar tvær ferðir at fáa restina av leikvøllinum við upp á spælið.

Men fyri tað skal ikki sigast, at talan var um nakran keðiligan túr hjá áskoðarunum. Tvørtur ímóti, so fingu tey eina ordans uppliving av bretsku fan-mentanini, og fram um alt, so var talan um Fair-Play. Føroyska liðið fekk eins nógvar klappsalvur, sum lokalu hetjurnar, og einki er at ivast í, at fleiri av hesum grøn-klæddu hava ætlanir um at koma til Føroyar í komandi ári. Tá er tað so bara vit, sum skulu prógva, at vit eiga munin. Bæði á og uttan fyri vøllin!


